## Missiónsvika í Kollafirði



Missiónsvikan í Kollafirði byrjar týskvøldið kl. 20.00 við Jórun Malakiev, Menn úr Kollafirði syngja. Hildið verður fram Mikukvøldið kl. 20.00 við Pól Johannesen, Kór úr Meinigheitshúsinum syngur. Hóskvøldið kl. 20.00 talar Sólrun Poulsen, og kvinnur úr Kollafirði syngja. Fríggjakvøldið kl. 20.00 talar Jógvan Fríðrikson, og menn úr Fuglafirði syngja. Leygarkvøldið kl. 20.00 talar Tummas Juul Askham, og Miktam úr Kollafirði syngja. Sunnudagin kl. 14.00 verður sunnudagsskúli, og møti verður kl. 18.00 við Regin Høgnesen, og menn úr Leirvík syngja. Øll kvøldini verður bønarløta ½ tíma áðrenn møti, og ein drekkamunnur á loftinum aftaná. Øll eru hjartaliga vælkomin, heilsa tey úr Kollafirði.

## Geir Haarde skurðviðgjørdur

Geir H. Haarde, sum júst hevur lagt frá sær sum íslendskur forsætisráðharri, varð í gjár lagdur undir skurð á einum sjúkrahúsi í Amsterdam í Niðurlondum. Geir H. Haarde almannakunngjørdi í næstsíðstu viku, at hann hevði fingið staðfest ein illkynjaðan vøkstur í hálsinum. Morgunblaðið skrivar, at skurðviðgerðin eydnaðist væl, men at Geir H. Haarde skal halda frí eina tíð. Hann er formaður í Sjálfstæðisflokkinum, men hevur boðað frá, at hann fer frá á landsfundinum, sum verður í næsta mánað.

# st meira pengar



...milliónir, og má tí spara, sigur Lis Mortensen. – Hevur man gjørt starvssetanir upp á »forvantet fangst« á ..., sigur Anfinn Kallsberg

mynd: Tilgjørd mynd

fram, til mann at enda hevur soldað niður til tey fólkini, ið skulu fáa boð.

– Síðan megnaðu vit at fáa avtalu í lag við tey fólkini, sum vóru mett at verða tey røttu til størvini. Tað er nú lukkast at seta navn á sjey spesialiseraði vísindafólk upp á nakrar fáar mánaðir, og tað er eitt stórt bragd, staðfestir Lis Mortensen.

### Trupulleikin

Tá komið er til 1. januar 2009, eru vísindafólkini farin til arbeiðis, og útbúgvingarnar farnar í gongd. Hinvegin er nógv farið fram á politiska pallinum síðan 30. mai, tá játtanin varð givin. Nýtt landsstýri er skipað, og fíggjarkreppa hevur tikið seg upp. Tí standa sparingar fremst á skránni hjá nýggja landsstýrinum.

Tá lønarjáttanin hjá Fróðskaparsetrinum varð sett til 21,4 milliónir, varð roknað við løn til nýggju starvsfólkini í fimm mánaðir. Tí skuldi játtanin hækkast til 27,5 milliónir í 2009, soleiðs at lønir kundu verða útgoldnar í 12 mánaðir, og verandi virksemi kundi halda fram.

Tó vórðu ikki meira enn 17,5 milliónir nýttar í 2008, av tí at vísindafólkini ikki vóru sett beinanvegin.

– Mann finnur tilsamans 10 fólk, sum skulu bera nýggju útbúgvingarnar. Hesi fólkini kosta fimm lønarmánaðir í 2008, men 12 lønarmánaðir í 2009. Tí má lønarkarmurin ikki standa í stað. Lønarkarmurin má vaksa, umframt trý prosent til lønarvøkstur. Hetta er tað, sum ger, at 5,3 milliónir koma at mangla í, staðfestir Lis Mortensen.

Anfinn Kallsberg segði við Rás2 í farnu viku, at lønarjáttanin til Fróðskaparsetrið er 22,2 milliónir í 2009, og at tað var ein stórur vøkstur frá tí, sum varð nýtt í fjør, umframt at hetta var í ríkiligt mát.

### Loysnirnar

Fíggjarlógin er nú samtykt, og tað mangla 5,3 milliónir krónur í.

Stýrið fyri Fróðskaparsetrið hevur enn ikki tikið endaliga avgerð um, hvussu sparast skal. Farast má ikki út um lønarkarmin, og tí eru fleiri worst-case-scenario sett upp. Er eitt av teimum er, at lata vera við at taka næmingar inn á Søgu- og Samfelagsdeildina, ikki at seta útbúgvingina MA. í løgfrøði á stovn, umframt at siga fleiri fólkum úr starvi, soleiðs sum útmeldingin ljóðaði fyri eini viku síðan.

– Tá mann longu hevur tikið næmingar inn, hevur mann skyldu til at geva teimum eina útbúgving, og tað mugu vit taka fyrilit til, sigur Lis Mortensen, forkvinna í stýrinum fyri Fróðskaparsetrið.

Sostatt tykjast bæði Lis Mortensen og Anfinn Kallsberg hava grein í sínum máli, tá Lis Mortensen sigur, at játtanin ikki røkur til, og skerjingar mugu gerast, og tá Anfinn Kallsberg sigur, at Fróðskaparsetur Føroya hevur fingið størri játtan enn undanfarin ár.

### Tingsins vilji

Tað er til eina og hvørja tíð Løgtingið, ið ger av, hvørjar raðfestingar skulu gerast. Tingið ger av, um Fróðskaparsetrið skal upp- ella niðurraðfestast. Tað er leiðslan á Fróðskaparsetrinum eisini púra greið yvir.

– Vit vilja sjálvandi gera alt fyri at liva upp til tingsins vilja. Tá tey siga, at vit skulu seta fleiri útbúgvingar á stovn, so vilja vit vísa, at tað ber til. Vit vilja vísa teimum, at vit kunnu, og vóna at teir skilja, at tað tekur tíð, og má gerast ordiligt, sigur Lis Mortensen.

Hinvegin sigur Løgtingið, at farast skal ikki út um fíggjarkarmurin, og stýrið fyri Fróðskaparsetrið skal altíð liva upp til Tingsins vilja. Tí verða tey noydd at spara nakrar funktiónir og nøkur størv, soleiðs at tey framvegis kunnu liva upp til Tingsins vilja.

**FAKTA**

**Lønarkarmur hjá Fróðskaparsetri Føroya (í mió. kr.)**

| | |
|---|---|
| 2007 | 15,9 |
| 2008 | 21,4 |
| 2009* | 27,5 |
| 2009** | 22,2 |

*Upprunauppskot til fíggjarlóg til 2009
**Samtykt fíggjarlóg fyri 2009

## Onkur hevur eitt stórt problem

Anfinn Kallsberg, formaður í fíggjarnevndini, segði í tíðindunum á Rás2 týsdagin 27. januar, at tað er pressan, sum hevur vent forteknunum, og at mann hevur valt at uppprioritera virksemið á Fróðskaparsetrinum

Hinvegin heldur hann, at tað er onkur á Fróðskaparsetrinum, sum hevur eitt stórt problem.

»Vit samtykkja eina fíggjarlóg fyri eitt ár í senn. Og er tað soleiðis, at mann hevur gjørt starvssetanir á Fróðskaparsetrinum upp á »forvantet fangst« á eini fíggjarlóg í 2009, sum gongur út yvir hesi 26 prosentini í vøkstri, so hevur onkur eitt stórt problem, tí at vit kunnu ongantíð disponera út yvir eitt fíggjarár«.

Tá tíðindakvinnan spyr, um ikki tað er ringt at reka ein slíkan stovn, og ikki kunna planleggja meir enn eitt ár í senn, svarar Anfinn Kallsberg soleiðs:

»Jú, mann kann planleggja við teimum karmum, sum eru, og so tekur man tað soleiðs hen ad vejen, men tú skal minnast til ein ting. Vit eru komnir inn í eina kreppu, har vit síggja, at alt tað pulserandi lívið er noytt til at repa seglini. Hóast hetta, so hava vit hildið tað verið rætt at uppprioritera tað virksemi á Fróðskaparsetrinum, og hava givið teimum eina játtan, sum er 26 prosent hægri, enn tað, teir hava brúkt í 2008. Eg skilji ikki, at mann ikki kann planleggja út frá hesum fíggjarkarmum«.

-RN